

# 100 krónur

kostar eitt blikk av kálktablettum.

So fáa børnini um ikki annað kálk, tá vit nú ikki hava ráð til mjólk!

## STØK

Eitt fullsett hús, harímillum eisini fýra politikarar, lýddi á skakandi føroyska veruleikan, tá tær báðar Siri Hansen t.v. og Annika Antoniussen, sum báðar hava lisið Cand. Ped. Soc á Danmarks Pedagogiske Universitet, greiddu frá úrslitunum av kanningini

*Mynd: Jens Kristian Vang*

alt landið. Av teimum vóru fýra stakir pápar.

Í kanningini verður staðfest, at ein stakur uppihaldari skal forvinna í minsta lagi 30 prosent meira enn onnur, fyri at fáa tað at mæla runt. Sostatt skuldu tær heilt upp á eina inntøku á 42.000 krónur um mánaðin, áðrenn staki uppihaldarin sjálv/ur metti, at viðkomandi hevði nóg mikið.

### Børnini líða

Hesi 500 børnini líða neyð. Ikki afrikanskt fátækadømi, men lutfalsligt fátækadømi, sum tað verður rópt í okkara parti av heiminum.

Hetta er fátækt millum miðalhampaborgarar, sum kann elva til sosiala avbyrgjan, marginalisering og negativan sosialan arv hjá børnunum. Fyribrigdi, ið vanliga ikki verða góðtikin í skandinaviska vælferðarsamfelagnum. Men eftir øllum at døma í Føroyum.

Í kanningini um stakar uppihaldarar greiða foreldrini frá, at tað ringasta er ikki, at tey sjálvi mangla eitt sindur her og har. Nei, tað ringasta er, at børnini líða undir, at ráðini eru ongantíð til tað, sum onnur børn fáa. At børnini altíð skulu vera við undirlutan. Ongantíð sleppa at ferðast og at hava positivar upplivingar, sum tey kunnu deila við hini børnini. At tey ikki eiga leikur ella lutir, sum til dømis teldu, fartelefon, spælimaskinur, rulluskoytur og so framvegis.

Børnini hjá støkum uppihaldarum skilja seg burturúr rúgvuni, tí tey fáa ongantíð nýggjar, fínar leikur, sum er vælumtóktar millum hini. Leikur og upplivingar, sum eru so umráðandi fyri at kunna luttaka í sosialum virksemi saman við vinfólki.

- *..sum støk mamma havi eg ikki ráð at keypa teimum Playstation ella Nintendo DS o.s.fr.. grannagentan, sum dóttirin spælir við, eigur bæði Nintendo, Playstation og egna teldu, hóast hon er bert 5 ár. Dóttir mín dugir enn ikki at tendra eina teldu,* fortelur ein mamma.

Avleiðingin av, at barnið hevur ikki atgongd til teldu kann gerast, at barnið lærir ikki at brúka hana, tí tað sær ikki foreldrið brúka teldu.

- Materiella undirskotið kann hava avleiðingar fyri menningina og sosiala lívið hjá barninum. Eitt barn skal ikki altíð hava tað nýggjasta nýggja, men tað skal heldur ikki altíð vera sama barnið, sum onki fær, siga tær báðar, Siri Hansen og Annika Antoniussen í høvuðsuppgávuni.

**» – Eitt barn skal ikki altíð hava tað nýggjasta nýggja, men tað skal heldur ikki altíð vera sama barnið, sum onki fær**

### Skúlin ikki fyri fátøk

Men fíggjarliga trongstøðan í heiminum hevur ikki bara avleiðingar fyri materiella ríkidømið. Eisini í mun til upplivingar og tiltøk merkja familjurnar stóran mangul. Hetta hevur eisini við sær, at børnini mugu avlýsa sosial tiltøk.

Í kanningini nevna tær eitt nú hetta við, at spara upp til ferðir í skúlanum. Hetta kann vera sera trupult hjá einum støkum uppihaldara. Um viðkomandi til dømis hevur trý børn, sum skulu rinda 300 krónur á konto um mánaðin, so ber tað als ikki til, tá tiltøkupenginurin til mat, klæðir

framhald...